gult cyan magenta svart



## Altjóða Kvinnudagur 8. mars

Altjóða Kvinnudagurin verður hildin í Norðurlandahúsinum hóskvøldið tann 8. mars kl. 19.30 við framførslu av einkvinnuleiki úr Nobelvirðisløntu skaldsøgu Sigrid Undsets um Kirstin Lavransdatter.

Tað er norska sjónleikarakvinnan Juni Dahr, sum vit frammanundan kenna frá leikinum um Jeanne d´Arc, ið framførir leikin saman við víðagitnu jazztónleikarunum Arild Andersen og Tore Brunsborg.

## Eyðun Eliasen sýnir fram dreymaætlan

Leygardagin fer Eyðun Eliasen, arkitektur, at hava fyrilestur í Norðurlandahúsinum í sambandi við, at framsýning hansara “Huld rúm” letur upp. Fyrilesturin verður klokkan 14, og framsýningin letur upp klokkan 15.

Framsýningin er av endaligu uppgávuni hjá Eyðuni á arkitektskúlanum í Århus, sum snýr seg um at byggja eitt náttúruupplivilsi upp í Álvagjónni úti í Hesti.

Eyðun arbeiðir við náttúruni og teimum rúmum, sum eru har frammanundan, eins og hann á ein so náttúrligan hátt sum gjørligt brýtur inn í náttúruna. Niðri í gjónni, inni í øðrum vegginum, ger Eyðun nøkur rúm til tey, ið vitja Álvagjógv. Tað eru hesi rúm, sum framsýningin snýr seg sum. Verkætlanin verður víst í tekningum, modellum og myndum.

Henda verkætlanin var eisini við á vistfrøðiligu rástevnuni hjá UNESCO í Costa Rica, í september 2000, har Eyðun Eliasen vann 2. virðisløn í altjóða arkitektakapping. Framsýningin er í húsinum til og við 26. mars 2001.

## Nýggir nevndarlimir í Føroya Pedagogfelagi

Á aðalfundinum hjá Føroya Pedagogfelagi, sum var tann 24. mars, stóðu Jutta Mortensen og Maud Wang Hansen fyri vali, men tær stillaðu ikki uppaftur.

Bjørghild í Geil og Ann-Elisabeth Joensen vórðu valdar í nevndina. Hinir nevndarlimirnir eru Elsa Klein Hansen og Anna Hvannastein, meðan Carita Bjørklund er formaður. 930 limir eru í Føroya Pedagogfelagi.

## Økisfundir hjá Javna

Mánakvøldið 5. mars skipar Javni fyri økisfundum kring landið, og í ár verður evnið arbeiðið hjá menningartarnaðum.

At hava eitt gott arbeiði hevur stóran týdn-ing fyri øll, eisini menningartarnað. Nøkur menningartarnað eru í vanligari vinnu. Tey flestu av teimum hava fyrst arbeitt á vardum verkstaði og eru upplærd har.

Fundirnir kring landið verða ikki eins, men endamálið er tað sama. Ætlanin er, at starvsfólk, avvarandi eins og tey menningartarnaðu sjálv fara at greiða frá, um hvat er gott, og hvussu tey kundu hugsa sær at betra arbeiðsumstøður sínar. Ofta er spurningurin um lønirnar, sum tey fáa á verkstøðunum, á lofti, og tí verða umboð frá Almannastovuni við á fundunum. Somuleiðis umboð frá stovnum og fyritøkum, ið hava menningartarnað í arbeiði uttanfyri tað vanliga varda verkstaðið, luttaka.

Javni heitir á øll, ið eru áhugað í arbeiðsviðurskiftunum hjá teimum menningartarnaðu, um at møta upp og ver a við til at siga sína hugsan.

Økisfundirnir eru í Klaksvík á verkstaðnum á Brekku kl. 19. Í Vági á verkstaðnum á Bakka kl. 20. Í Runavík í verkhúsinum Stýggjur kl. 19.30. Í Miðvági í Húsmøðrafelagnum kl. 19. Á Argjum á verkstaðnum Vón kl. 19. Allir fundirnir eru almennir.

# Anna Askham 100 ár

Mánadagin 5. mars verður omma 100 ár! Tað er heilt ørkymlandi at hugsa um at hon hevur upplivað 100 ár. Og upplivað er rætta orðið at brúka um ommu, tí hon hevur ikki bara livað, men upplivað.

Tað var soleiðis serstakt fyri ommu, at vit plagdu at ringja, áðrenn vit fóru at vitja. Tí annars var langt frá vist at hon var inni. Eg minnist at vinirnir plagdu at halda tað vera eitt sindur løgið. Tí ommur eru jú altíð inni! Men ikki omma. Hon kundi vera í KFUK, í pensionistafelagnum, ella hugna sær saman við systrum sínum.

Henni dámar serstakliga væl at fáa gestir, og er altíð blíð tá man kemur inn á gólv. Tá eg var barn plagdi eg ofta at vitja hana sunnudagar. Tá sótu vit í tí fínu stovuni, og har lógu albummini undir sofaborðinum. Album fylt við ferðaminnum úr Danmark og Englandi, og við myndum av familju, vinum og kenningum. Eftirsum man ikki bindur ella ger annað arbeiðið inni hjá henni sunnudagar, hugdu vit í album. Omma greiddi livandi frá myndunum, so vit á henda hátt fingu innlit í lív hennara og ymiskar hendingar. Og so kom tann deiliga løtan tá omma fór at gera drekka. Til fyri fáum árum síðani diskaði hon upp við køkum, ið vunnu eina samanbering víð køkurnar hjá Frants!

Ì heila tikið hevur hon serstakar hendur. Umframt at hon bakaði bestu køkur í verðini, hevði hon eisini tað fínasta jólatræði, og bakaði hvørji jól eitt fantastiskt køkuhús, og seymaði og bant dýr við so fittum trýnum at man mátti hava tey. So nógv eru tey, ið hava roynt at vunnið tey í eydnuhjóli ella keypt tey á basarum í KFUK.

Og omma hevði ein dukkubeiggja. Hann var á loftinum saman við Richsalbumunum. Tá mann kom at vitja fór antin hon ella vit á loftið eftir teimum. Dukkubeiggjan hevði hon vunni í Danmark. Richsalbumini við Peter Pan, Tarzan og øðrum Richssamlumyndum stammaðu frá krígnum. Seinna krígnum. Ja, tað má undirstrikast, tí omma hevur upplivað bæði kríggini. Hon var stór genta undir fyrsta veraldarbardaga. Og tá annar veraldarbardagi breyt út var hon ein tilkomin kona við manni og seks børnum.

Omma hevur skarað fram úr, tá tað snýr seg um hondarbeiðið. Í 1924 var hon á hondarbeiðsskúla í Keypmannahavn og lærdi millum annað at seyma hattar. Hetta var í einari tíð, tá hestavognar koyrdu í Keypmannahavn, og tað er áhugavert at hoyra hana greiða frá útferðum og upplivingum hon hevði í stórbýnum. Um hesa tíðina hevði hon longu møtt abba, sum hon giftist við árið eftir. Hon vard gift inn til verðforeldrini á Landavegnum og búði har í 10 ár, inntil tey fluttu í egin hús við Hoydalsvegin. Har býr honn enn. Í dag mitt í býnum, men tá nærmast úti í haganum.

Sjálvt um eg var smágenta, tá abbi doyði, minnist eg hann rættuliga væl. Eg var so heppin at eg við hvørt búði hjá ommu og abba í nakrar vikur tá eg var lítil. Eg minnist at abbi plagdi at lata meg ríða á bakinum á Skott. Ein hundur, ið var líka fittur sum hann var stórur. Abbi var sannur djóravinur. Tað sæst millum annað av, at teir báðir hava verið hjá fotografi, abbi og Skott báðir, og hanga innrammaðir á vegginum hjá ommu.

Omma og abbi hava 92 eftirkomarar. Seks børn, 26 ommubørnum, 60 langommubørn og tvey oldurommubørn.

Eitt tað besta við ommu er, at hon hevur fingið lívsgleðina í gávu, tá hon var fødd. Hon hevur evnini at síggja tað besta í øllum. Hon er glað, smílandi, prátingarsom og luttakandi. Ein góð fyrimynd fyri okkum, ið eru so heppin at vera ein partur av lívi hennara.

Hóðast aldurin er farin at bila, og eyguni og oyruni ikki eru sum tá hon var 90, er hon tíðliga uppi hvønn dag og bindur og lesur. Langommubørnunum dáma væl at bjóða henni av at spæla Olsen, men mugu sanna at langomma ofta vinnur!

So orðafellið “Man er ikki eldri, enn man ger ser til” passar í sonnum til ommu.

Tillukku vid føðingardegnum og kærar heilsur

**Anna**

# Ungt virki framsýning á Torginum í SMS

Fríggja- og leygardagin 02.-03. mars sýna skúlanæmingar á Føroya Handilsskúla vørur fram á Torginum í SMS.

Í alt fýra virkir sýna forvitnisligar og spennandi vørur fram, sum tey, við sínum egnu virkjum, hava virkað til. Úrvalið av vørur á søluframsýningini í SMS er víttfevnandi, heilt frá fløgu til føroyskt heimavirki.

Søluframsýningin hjá skúlanæmingunum er liður í kappingini, Ungt virki, har næmingar í støðisárinum á Føroya Handilsskúla kappast um at gerast ársins virki.

Næmingarnir skulu stovna virki, sum teir reka í skúlaárinum og taka av, tá árið er liðið. Tiltakið skal vekja áhugan hjá næmingunum at skapa nakað sjálvi. Ungt virki er skipað sum ein kapping, har vinnarin sleppur víðari at kappast við aðrar




Fýra virkir eru við í kappingini. Íognarfelagið Hammb, hevur gjørt eina ” guide” við gongutúrum í Nólsoy. Ung-t ger T-skjúrtur við sokallaðum kulttekningum á bróstinum. Virkið ÁBBA hevur gjørt eina fløgu við kendum føroyskum løgum. Hesi virkini eru øll frá Handilsskúlanum í Havn. Fjóðra virði, LEIA, er frá Handilsskúlanum á Kambsdali. Teirra høvuðsvøra er eitt ullint undirlag/teppi, sum er serliga vælegnað til giktsjúk. Annars selja tey eisini ymiksar vørur úr føroyskari ull- Alt hetta kann upplivast á Torginum í SMS hetta vikuskiftið. Framsýningin er opin til kl. 19.00 fríggjadagin og kl. 17.00 leygardagin. Kl. 16.00 leygardagin verður vinnarin av søluframsýningini í SMS kunngjørdur á Torginum.



Bretski fiskimálaráðharrin við føroyingar:

# - Latið okkum fáa meira fisk



*Anfinn Kallsberg, løgmaður á fundi við bretska fiskimálaráðharran Elliot Morley í London.*

*Mynd Jan Müller*

**Minkandi kvotur og niðurfiskaðir fiskastovnar og nú tann herviliga munn-og kleyvsóttin fara at skunda undir eftirspurningin eftir fiski úr øðrum londum og heitir bretski fiskimálaráðharrin, Elliot Morley í eini samrøðu við Sosialin inniliga á føroyingar um at selja bretum meira fisk**

LØGMAÐUR Á ALMENNARI VITJAN

*Jan Müller úr London*

Tað var tann tíð, tá bretar meira enn nakrantíð tørvaðu fisk frá føroyingum, nevniliga undir seinna heimskríggi. Nú hevur ein – um ikki júst eins álvarslig støða – tikið seg upp, har risastóru bretski heimamarknaðurin rætt og slætt skríggjar eftir fiski. Talan er um herviligu munn- og kleyvsóttina, sum er farin at herja kring alt Stórabretland sum skógareldur. Longu nú er nærum ógjørligt at fáa kjøt í handlunum og tí veksur eftirspurningurin eftir fiski við rúkandi ferð. Men eisini minkandi kvotur og niðurfiskaðir fiskastovnar gera sítt til at økja um eftirspurningin. Og hetta fer heilt vist at fáa uppaftur størri týdning fyri útflutningin úr Føroyum.

Bretski fiskimálaráðharrin Elliot Morley umrøddi fleiri av hesum spurningum undir fundinum hann hevði við Anfinn Kallsberg, løgmann í London í vikuni.

– Vit høvdu ein sera góðan og siðiligan fund, har vit viðgjørdu fiskivinnumál, sum hava okkara felags áhuga. Bæði londini taka fiskivinnuna sera álvarsliga, og eg veit og viðurkenni, at fiskur er av alstórum týdningi fyri føroyska búskapin. Men føroyskur fiskur hevur eisini ómetaliga stóran týdning fyri okkara búskap og fyri okkara framleiðsluídnað sigur Elliot Morley, sum leggur stóran dent á at siga føroyingum, at bretar klára ikki í dag at fiska nóg nógv til at klára eftirspurningin í Bretlandi. – Tí eru vit bundin at innflutningi av fiski, og her er føroyskur fiskurin av alstórum týdningi, eins og okkara marknaðurin hevur stóran týdning fyri føroyingar.

Elliot Morley sigur víðari, at hann og løgmaður viðgjørdu eisini altjóða umsiting og regulering av fiskastovnum, eitt øki, sum bæði londini hava felags áhuga í og ynskja framstig.

# Bretska stjórnin meira hóvlig í grindaspurninginum

**Bretska stjórnin er eftir øllum at døma nógv meira hóvlig í spurninginum um føroyska grindadrápið, enn hon hevur verið fyrr. Ein orsøk er tann, at føroyingar hava bøtt um drápsháttin. Hetta stig fegnaðist bretski fiskimálaráðharrin um á fundi við løgmann í vikuni**

LØGMAÐUR Á ALMENNARI VITJAN

*Jan Müller úr London*

– Vit tosaðu eisini um grindadráp, og tað kemur ikki óvart á løgmann, at hvalur er eitt sera kensluligt evni í Bretlandi. Andstøðan móti hvalaveiðu er stór her. Vit skilja væl føroysku siðirnar í sambandi við grindadráp, men tað eru ivaspurningar viðvíðkjandi drápsháttinum og tíðini, sum gongur til grindahvalur er deyður, sum vit hava áhuga fyri. Men eg veit, at landsstýrið skilur hetta og tekur málið í størsta álvara sigur bretski fiskimálaráðharrin Elliot Morley, sum samtíðis fegnast um tey skilagóðu stig, sum føroyingar longu hava tikið fyri at betra um eitt nú drápsháttin.

Á fundinum við løgmann greiddi Elliot Morley frá, at bretar høvdu vísindafólk í altjóða hvalanevndini, sum høvdu arbeitt við spurninginum um »human killing« te. menniskjansligt dráp. – Eg segði løgmanni, at vit vildu fegnir vísa føroyingum alt okkara tilfar, og at vit samtíðis vóru áhugaðir í tí tilfari og upplýsingum, sum føroyingar høvdu at lata okkum. Sjálvur haldi eg, at altjóða samstarv innan vísindi er av stórum týdningi.

# Mugu semjast um svartkjaft

**Løgmaður mælti á fundinum við bretska fiskimálaráðharran til, at bretar og føroyingar draga eina línu og finna saman um eina semju, áðrenn svartkjafturin skal býtast**

LØGMAÐUR Á ALMENNARI VITJAN

*Jan Müller úr London*

Anfinn Kallsberg, løgmaður er sera væl nøgdur við fundirnar hann hevur havt hesa vikuna við bæði skotska og bretska fiskimálaráðharran. Á fundinum við Elliot Morley, sum er bretskur ráðharri fyri fiskivinnu og fyri útjaðaran vóru felags fiskivinnuáhugamál viðgjørd.

– Vit umrøddu nógv av teimum somu málunum, sum vórðu viðgjørd á fundinum við skotska fiskimálaráðharran eitt nú felags fiskistovnar, gráa økið, regulering á Rockall-leiðini o.a. Men tað var kanska serstakliga spurningurin um svartkjaftin, sum varð tikin upp sigur Anfinn Kallsberg.

Í løtuni eru samráðingar um at finna eina semju um kvotuna. – Har eru tað jú serliga ES og har serstakliga Bretland og Føroyar, har svartkjafturin heldur til, og tí eisini eftir míni meting tey strandalondini, sum hava størsta orðið at siga, tí tað er jú í hesum økinum svartkjafturin kann fiskast. Kunnu føroyingar og bretar finna saman um eina semju, so standa vit rættiliga sterkir í tí býtinum, sum har kemur burtur úr. Løgmaður viðgongur tó, at trupulleikin er tann, at vit í dag fiska kanska tvífalt so nógv av svartkjafti sum fiskifrøðingar mæla til at fiska. – Tvs. at her skal ein veldug minking til og hon er altíð ring at selja politiskt hjá øllum.

Løgmaður sigur, at bretar heittu á føroyingar um at hjálpa teimum at fáa tikið upp í altjóða felagsskapum, at fáa regulerað veiðuna eftir smáhýsu við Rockall, sum er vorðin altjóða sjógvur. – Vit svaraðu, at hetta er eitt mál sum okkara fiskimálaráðharri tekur sær av men vit hava ta grundleggjandi støðu, at vit vilja vera við í regulering av fiskiskapi, soleiðis at tað verður fiskað á burðardyggum grundarlag, og tað varð væl móttikið.

Anfinn Kallsberg váttar, at teir eisini umrøddu grindadráp. – Vit góvu teimum tilfar um grind og grindadráp og greiddu teimum frá støðuni. Og tað haldi eg eisini kom heilt uppá pláss.



*Løgmaður uttanfyri Westminister Abbey*